Spurningar. 27. august

Vit hava fingið ein fyrispurning, um vit kunnu góðtaka teldur ið eru onnur teldumerkir enn Dell, Fujitsu, HP, Lenovo og Microsoft. Avgjørt er at vit hava ikki eitt ynski um at fáa onnur merkir í løtuni.

Vit hava fingið ein fyrispurning, um vit kunnu góðtaka at docking støðin verður av øðrum merki enn teldan (og harvið eitt annað merki, enn Dell, Fujitsu, HP, Lenovo og Microsoft) - hetta av tí at onkur veitari ikki kann veita docking støðir í løtuni, orsaka av heimsumfatandi chip manglinum. Hetta kann møguliga eisini merkja at docking støðin ikki kann tendra telduna.

Vit vilja allarhelst hava at docking støðirnar uppfylla krøvini og eru av sama merki sum teldan, men hava valt at góðtaka umbønina. Tað skal tó sigast, at um tilboð koma við 3. parts docking støðir, so kemur hetta at telja nógv niður í samlaðu metingini.